# Føroya fyrsti sexlei

**Dildo'ir, vibratorar, glíðikrem, falskar ginur og klitoris-kitlarar eru bert nakrar av leikunum, ið kunnu bíleggjast og verða bílagdar av føroyingum. Føroyar hava fingið sín fyrsta sexleikuhandil, og sølutølini prógva, at tørvur er á einum tílíkum handli, heldur eigarin Halla Sif Elvarsdóttir**




## Samrøða


Rólant Waag Dam
blaðmaður
rolant@sosialurin.fo

Vit hava sett eigaranum av alnetshandlinum stevnu. Hava avtalað at gera eina samrøðu við kvinnuna handan Daman.fo, sum við stovnanini av heimasíðuni og alnetshandlinum, í roynd og veru hevur latið upp Føroya fyrsta sexleikuhandil. Ein handil sum skal tryggja, at kynslívið hjá føroyingum ikki gerst ov eintáttað.

Vit eru heima hjá henni í Miðvági, og aftur við nýbryggjaðum kaffi fáa vit eitt litríkt og ikki minst øðrvísi prát, um sexleiku og kynslívið hjá føroyingum.

### Byrjaði við kropsrøkt

– Hví ikki, er hennara stutta svar, tá eg spyrji Hallu Sif Elvarsdóttir, hví hon er farin undir at selja sexleiku til føroyingar.

Tað var annars ikki við sexleikum, at virksemi hjá Hallu Sif Elvarsdóttir byrjaði. Tíðliga í fjør fór hon undir at selja vørur til kropsrøkt av hondgjørda íslendska merkinum Purity Herbs. Hetta gekk væl og seinni bílegði hon eisini kynsøsandi dropar.

– Og tað seldi forbiðið væl, heldur Halla fyri við einum smíli. Hon fór síðani undir at selja vibratorar. Teir vóru útseldir beinanvegin, og har frá vant virksemið bara upp á seg, soleiðis at alnetshandilin, sum hon fór undir um mánaðarskiftið juli/august, nú hevur alskyns úrval av sexleiku til bæði kvinnur og menn.




*Hondgjørdu íslendsku vørurnar hava føroyska áskrift*

### Fleiri mannfólk keypa

Fyrstu tíðina eftir at heimasíðan læt upp vóru vitjanir nógvar, men bíleggingarnar ongar. Halla Sif Elvarsdóttir fortelur, at tá hon sá at 200 vitjanir høvdu verið á síðuni, men eingin bílegging var komin, byrjaði at ivast eitt sindur, um tað fór at bera seg.

Men so komu fyrstu bíleggingarnar, og síðani tá hevur virksemið verið støðugt vaksandi. Í dag hevur heimasíðan dagliga millum 50 og 100 vitjandi, og fleiri teirra bíleggja eisini eitthvørt.

Hóast eg ikki rokni við at Halla fær at avdúka nakran av hennara kundum, kann eg ikki bara mær at spyrja, hvørji tað eru, sum keypa frá henni?

– Meirilutin er mannfólk, teir eru raskari at keypa enn kvinnurnar. Og bíleggingarnar koma úr øllum landinum, svarar Halla.

Hví so er, at tað eru fleiri mannfólk enn konufólk í hennara kundaskara, hevur hon einki eintýðugt

Sosialurin